## Fortuna til Hósvíkar

**FM KAPPRÒÐUR**
*Jóannes Hansen*

Nú er tað greitt, at hósvíkingar fáa møguleikan at taka lut í FM kappingini, sjálvt um teir sunnudagin fyri knøppum tveimum vikum síðani mistu spildurnýggja bátin, sum Sámal Hansen hevði smíðað fyri teir. Báturin gjørdist vrak, tá ið hann feyk av bilinum, sum var á veg til bygdastevnuna á Skála við honum.

Í Vestmanna eiga teir eitt 6-mannafar, sum eitur Fortuna. Teir fara ikki at rógva við tí í summar, og nú hava teir í Hósvík fingið møguleika at venja og rógva við Fortunu.

**jh**

## Ítróttarstevna



Summarstevnurnar verða alt meiri og meiri skýrdar at vera ítróttarstevnur. Tað er kanska ikki so løgið, um hugt verður at norðoyastevnuskránni í ár. Í fleiri ár hevur ítrótturin fylt nógv í henni, og í so máta er árið í ár onki undantak.

Talvkappingar av ymsum slagi, rennikappingar, súkklukappingar, kappróður og ikki at gloyma ein rúgva av fótbólti.

Tað er tó serliga norðoyastevnuaftan, at allur ítrótturin er. Og so landskappingar og steypadysturin millum fyrstu deildar liðini hjá KÍ og Skála, sum verður norðoyastevnudag klokkan trý.

Men takast kann ikki frá fyrireikarunum, at rættuliga nógv er at fara til á norðoyastevnu. Um enn tað ikki er so nógv øðrvísi enn undanfarin ár.

# Kapպróðurin breiðir seg kring alt landið

**Luttøkutalið verður kanska lægri, enn tað hevur verið, men tað er greitt, at fleiri øki kring landið fara at vera við í kappingini, enn tað hava verið**

**FM KAPPRÓÐUR**
*Jóannes Hansen*

Sambært talið á manningum, sum hava boðað frá, at tær ætla at taka lut í FM kappingini í summar, so eru ábendingar um, at tað ikki verður so stór luttøka, sum tað hevur verið undanfarnu árini. Í fjør boðaðu 96 manningar frá, at tær ætlaðu sær at taka lut. Í ár er talið 81. Í fjør lá luttakaratalið á hvørjari stevnu umleið 60. Tað letur til, at talið í ár verður eitt vet lægri.

– Royndirnar siga okkum, at tað altíð eru væl fleiri manningar, sum boða frá luttøku, enn talið er á manningum, sum møta upp.

Hetta sigur Hannis Joensen, sum framvegis er formaður í Róðrarsambandinum. Hannis vísir eisini á, at hóast luttakaratalið kanska fer at verða knappliga so stórt í ár, sum tað eitt nú var í fjør, so eru aðrar ábendingar um, at áhugin fyri kappróðrinum ikki er minkandi.

– Í nýggja kappingarárinum verður luttøkan størri kring landið, enn hon hevur verið undanfarnu árini. Eitt nú fara sandingar fyri fyrstu ferð at taka lut. Hoyvíkingar hava bjóðað seg fram, og so verður aftur eitt 10-mannafar úr Suðuroy við í kappingini.

Sandingar hava keypt eitt 6-mannafar frá Havnar Róðrarfelag. Tað er tann Gongurólvurin, sum Magni Nielsen smíðaði fyri nøkrum árum síðani. Hann luttók í fjør undir navninum Víkingur. Tá luttók Havnar Róðrarfelag við einum nýggjum Gongurólvi, sum Sámal Hansen hevði smíðað. Nú eitur tann báturin Víkingur, og Havnar Róðrarfelag bjóðar seg enn eina ferð fram við nýggjum Gongurólvi. Gamla Víkingin hava teir altso selt til Sands.

### Stór kapping

Seinnu árini hevur tað gingið eitt sindur striltið við luttøkuni í kappingini millum 10-mannafør. Okkurt árið hava tey bara verið fýra, sum hava kappast. Til nýggju kappingina hava níggju bátar boðað frá luttøku. Kortini er greitt, at tríggir teirra fara ikki at vera við í kappingini um FM



*– Luttøkutalið verður helst lægri í ár*

heitið, sjálvt um onkur teirra kanska fer at luttaka í onkrum róðrinum. Klaksvíkingur, Skálabáturin og Ormurin Langi fara neyvan at verða drúgvir.

– Fyri kappingina er tað sera hugaligt, at hoyvíkingar nú fara at taka lut við nýggjum 10-mannafari. Hoyvík er stórt pláss, og har eru nógvir ungdómar. Teir luttaka í fleiri ítróttargreinum, og tí er tað sjálvsagt, at teir eisini fara at taka lut í kapppróðri. Báturin er mannaður við royndum rógvarum, so tað er einki at ivast í, at teir fara at gera seg galdandi. Vágbingur er eisini mannaður við royndum monnum. Havnarbáturin, Eysturoyingur, Vestmenningur og Nólsoyingur eru altíð framvið. So vit hava loyvi at rokna við og gleða okkum um, at kappingin millum 10-manna-førini fer at vera breiðari og størri, enn hon nakrantíð hevur verið, heldur Hannis Joensen.

### Skifta ímillum

Fleiri ferðir hevur tað verið soleiðis, at tær fyrstu kappingarnar hava verið á longru teinunum, og at tað fram ímóti Ólavsøku og á Ólavsøkuni hevur verið kappast á styttru teinunum. Manningarnar hava so havt møguleika at laga venjingina eftir hesum. Soleiðis verður tað ikki í ár. Nú fer tað at verða kappast næstan skiftivís á longru og bara styttru teinunum.

Á Norðoyastevnu fer at verða kappast á 1000 og 1500 metrum. Á Skálafjørðinum og í Hvalvík fer at verða kappast á øllum trimum teinunum. Á Jóansøkuni í Vági fer bara at verða róð á stutta teininum innanfyri brimgarðin, og í Vestmanna fer eisini bara at verða kappast á 1000 metrum. Á Vestanstevnuni í Sørvági fer at verða róð á 1000, 1500 og 2000 metrum, og so verður endað á Havnarvág og á 901,30 metrum.

### Fyrireikaðu seg

Síðsta leygardag hevði Róðrarsamband Føroya sett allan dagin av til fyrireikingar til róðrarárið, sum stendur fyri durum. Fyrrapartin vóru tveir fundir. Annar var við dómararnar - startdómararnar, høvuðsdómararnar og eygleiðararnar. Síðani var fundur við stevnufyrireikararnar. Seinnapartin vóru tvey umboð fyri hvørja manning bjóðað í neystið hjá Argja Róðrarfelag, har tað varð greitt frá og víst, hvussu tað gongur fyri seg, tá ið bátarnir verða lagdir, og tá ið tað verður farið undir róðurin og kappast.

– Vit hava sera góðar royndir av hesum tiltakinum. Tað er gevandi at koma saman og tosa um tingini undir øðrum umstøðum, enn tær eru, tá ið spenningur og nervar eru uppi í, og tá ið eingin hevur ráð til nakran kiksara. Vit vóna, at hetta tiltakið, sum er á skránni stutt undan Norðoyastevnu, skal hava við sær, at felags fatanin verður størri, og at tað slepst undan misskiljingum og kiksarum, sum øll vilja sleppa undan, sigur Hannis Joensen, formaður í Róðrarsambandi Føroya.

# Raðfylgjan til kappróðurin á norðoyastevnu

Leygardagin 5. juni fara 55 bátsmanningar at rógva fyrsta FM róðurin, sum vant verður á norðoyastevnu. Startrøðin verður hendan:

### 5-mannafør dreingir

1. Báran
2. Havfrúgvin
3. Tekla
4. Tjaldrið
5. Kollur
6. Svanur
7. Royndin Fríða
8. Sílið
9. Firvaldur
10. Fípan Fagra
11. Blikur
12. Drekin
13. Spógvin

### 5-mannafør gentur

1. Hvassi
2. Blikur
3. Spógvin
4. Ørnin
5. Tjaldrið
6. Falkur
7. Junkarin
8. Frúgvin
9. Drekin
10. Tekla
11. Havfrúgvin
12. Firvaldur
13. Sílið
14. Fípan Fagra

### 6-mannafør kvinnur

1. Gongurólvur
2. Páll Fangi
3. Lómur
4. Sundabáturin
5. Sølmundur
6. Jarnbardur
7. Víkingur

### 6-mannafør menn

1. Hósvíkingur
2. Lómur
3. Sundabáturin
4. Hvessingur
5. Jarnbardur
6. Strálan
7. Gongurólvur
8. Sølmundur
9. Sandingur
10. Víkingur

### 8-mannafør

1. Argjabáturin
2. Kvívíkingur
3. Ørvur
4. Knørrur
5. Nevið Reyða

### 10-mannafør

1. Eysturoyingur
2. Nólsoyingur
3. Hoyvíkingur
4. Havnarbáturin
5. Vágbingur
6. Vestmenningur

### Barnaróður, gentur

1. Blikur
2. Tekla
3. Drekin
4. Fípan Fagra
5. Ørnin
6. Royndin Fríða

### Barnaróður, dreingir

1. Havfrúgvin
2. Fípan Fagra
3. Blikur
4. Royndin Fríða














